# Borgarstjóraeffektin ger framvegis um seg

**Borgarstjórin, Jan Christiansen, styrkti sína støðu í Tórshavnar býráð við einum rimmar vali við 565 persónligum atkvøðum**

VALIÐ 04
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Borgarstjórin í Tórshavnar kommunu seinastu fýra árini fekk eitt rimmar býráðsval við heili 565 persónligum atkvøðum, sum eru yvir 200 atkvøður fleir enn á seinasta býráðsvali. Fólkaflokkurin í Tórshavnar kommunu fekk eisini eina stóra framgongd á valinum, tí flokkurin gekk slakar 600 atkvøður fram.

– Vit fáa ein kvitering fyri okkara góða arbeiði seinastu fýra árini. Her hugsi eg serliga um góða fíggjarpolitikkin, og at tørvurin á barnaansingarplássum er nøktaður. Tað er eisini givið, at Fólkaflokkurin hevði ein ómetaliga sterkan lista hesaferð, har vit høvdu valevni bæði í Kaldbak, Argjum, Nólsoy og Kollafirði, sigur Jan Christiansen.



*– Vit fáa ein kvitering fyri okkara góða arbeiði seinastu fýra árini. Her hugsi eg serliga um góða fíggjarpolitikkin, og at tørvurin á barnaansingarplássum er nøktaður. Tað er eisini givið, at Fólkaflokkurin hevði ein ómetaliga sterkan lista hesaferð, har vit høvdu valevni bæði í Kaldbak, Argjum, Nólsoy og Kollafirði, sigur Jan Christiansen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Borgarstjórin í Havn var sum vera mann eisini fegin um persónligu úrtøkuna. Jan Christiansen fekk sítt besta býráðsval nakrantíð við 565 atkvøðum. Eins og undangongumenninir í borgarstjórasessinum í Tórshavnar kommunu spældi sonevnda borgarstjóraeffektin ein týðandi leiklut á valinum hesaferð.

### Harmiligt við sambandinum

Samgongufelagin hjá Fólkaflokkinum, Sambandsflokkurin, gekk nógv aftur á býráðsvalinum hesaferð. Jan Christiansen var ógvuliga harmur um afturgongdina hjá Sambandsflokkinum.

– Støðan hjá Sambandsflokkinum er harmilig, men eg haldi ikki, at vit kunnu taka afturgongdina á okkum. Eg helst sæð, at Sambandsflokkurin kom styrktur úr valinum, men á hátt er valúrslitið hjá teimum ikki óvæntað, tí teirra listi hesaferð var ikki av teimum sterkastu, sigur Jan Christiansen.

**FAKTA**

### Borgarstjóraeffekt 1980-2004

1980-1984: Poul Michelsen 230 atkv. til 1307
1984-1988: Poul Michelsen 1307 atkv. til1169
1988-1992: Poul Mivhelsen gevst í´92
1992-1996: Lisbeth L. Petersen 787 atkv. til 1003
1996-2000: Leivur Hansen 223 atkv. til 524
2000-2004: Jan Christiansen 308 atkv. til 565






# Heðin verður nýggjur borgarstjóri

**Heðin Mortensen loysir Jan Christiansen av sum borgarstjóri í Tórshavnar kommunu. Tað er ikki ein samdur Sambandsflokkur, sum fer í samgongu við Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin**

VAL 04
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Hann hevur verið býráðslimur síðan 1972, og hann hevur leingi gingið við einum borgarstjórasessi í búkinum. Royndi býráðspolitikarin hjá Sambandsflokkinum, Heðin Mortensen, hevur eftir 32 ár í býráðspolitikki, har hann hevur umboðað bæði Uttanflokkalistan og seinni Sambandsflokkin, vunnið seg fram til borgarstjóra í Tórshavnar kommunu.

Hetta varð greitt á middegi mikudagin, tá Sambandsflokkurin, Javnaðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin skrivaðu undir samgongusáttmála fyri tey næstu fýra árini. Borgarstjórasessurin hjá Heðini er kortini ikki komin undir land uttan svørslag, tí hvørgin av partamonnum Heðin í Sambandsflokkinum, Beate L. Samuelsen ella Høgni Mikkelsen, hava skrivað undir samgongusáttmálan.



*-Eg var als ikki nøgdur við útspælið hjá Fólkaflokkinum, og tí valdi eg at royna aðrar leiðir. Eftir mínum tykki er eingin avtala brotin, tí talan var ikki um eina bindandi avtalu, sigur nýggi borgarstjórin, Heðin Mortensen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Ósamdir

Sum skilst høvdu Fólkaflokkurin og Sam-bandsflokkurin eina skrivliga avtalu í nátt um at halda fram í samgongusamstarvinum, og tað er júst hendan avtala, sum forðar Beatu og Høgna at fylgja nýggja borgarstjóranum í nýggja meirilutan í Tórshavnar býráð.

Heðin Mortensen vísir staðliga aftur, at hann hevur brotið avtaluna við Fólkaflokkin. Hann sigur, at nýggja samgongan hevur tikið fyrilit fyri bæði Beatu og Høgna, og tað stendur teimum frítt í boði at fáa formansessir í nýggju samgonguni

– Avtalan, sum varð gjørd í nátt var bert ein fyribilsavtala, sum skuldi binda partarnar at tosa saman aftur í dag. Vit høvdu hvørki gjørt avtalu um borgarstjóra, samgonguskjal og nevndarsessir, og eg var als ikki nøgdur við útspælið hjá Fólkaflokkinum, og tí valdi eg at royna aðrar leiðir. Eftir mínum tykki er eingin avtala brotin, tí talan var ikki um eina bindandi avtalu, sigur nýggi borgarstjórin

*Er Sambandsflokkurin farin í tvíningar í Tórshavnar býráð?*

– Mær vitandi er Sambandsflokkurin ikki farin í tvíningar. Vit verða noydd at gera okkum galdandi eftir vánaliga valúrslitið í Havn, og tað kunnu vit við at standa á odda fyri kommununi, sigur Heðin Mortensen.

Hann leggur afturat, at nýggja samgongan hevur tikið fyrilit fyri bæði Beatu og Høgna, og tað stendur teimum frítt í boði at fáa formansessir í nýggju samgonguni.

*Hvat hendur um Beata og Høgni siga nei?*

Ja, so verið eg einsamallur í samgonguni, tí í politikki er tað einaferð avgerandi at fáa ávirkan, sigur hann.

Spurdur, hvørja støðu floksformaðurin í Sambandsflokkinum, Kaj Leo Johannesen, hevur til innanhýsis stríðið í Sambandsflokkinum, svarar Heðin Mortensen, at floksformaðurin er fegin um, at Sambandsflokkurin hevur fingið borgarstjórasessin í størstu kommunu í landinum.

**FAKTA**

### Samgongan í Tórshavnar býráð

**Borgarstjóri:** Heðin Mortensen
**Varaborgarstjóri:** Jógvan Arge

**Formanssessir:**

**Fíggjarnevndin:** Sambandsflokkurin
**Mentamálanevndin:** Tjóðveldisflokkurin
**Byggi- og býarskipanarnevndin:** Javnaðarflokkurin
**Tekniska nevnd:** Tjóðveldisflokkurin
**Sosiala nevnd:** Sambandsflokkurin
**Heilsu- og umhvørvisnevndin:** Javnaðarflokkurin
**Havnarnevndin:** Tjóðveldisflokkurin

Høgni Mikkelsen:

# Heðin hevur brotið avtaluna

**Um hálvgum tvey tíðina mikunáttina, varð ein avtalað undirskrivað ímillum Fólkaflokkin og Sambandsflokkin, um at manna samgonguna í Tórshavnar Býráð. Men mikumorgunin skrivaði Heðin Mortensen eisini undir eina aðra avtalu**

VALIÐ 04
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

– Heðin Mortensen skrivaði, saman við restini av Sambandsflokkinum undir eina avtalu í nátt einaferð um hálvgum tvey tíðina. Nú havi eg hoyrt, at hann hevur brotið tað avtaluna, og hevur skrivað undir eina avtalu ímillum Tjóðveldisflokkin, Javnaðarflokkin og seg, sigur Høgni Mikkelsen.

### Sambandið heldur avtaluna

Høgni slær tó fast, at hvørki hann ella Beata L. Samuelsen ætla sær at leypa frá avtaluni, sum varð undirskrivað í nátt.

– Sambandsflokkurin hevur skrivað undir eina avtalu, og tað standa vit við. Vit eru fullkomiliga skelkað av tíðindunum, sum vit í morgun frættu, um at Heðin hevur brotið avtaluna, sum vit gjørdu í nátt. Vit vistu ikki betur enn, at tað sum vit skrivliga avtalaðu í nátt, tá øll skrivaðu undir, var galdandi, greiðir Høgni Mikkelsen frá.

Hann staðfestir, at Heðin Mortensen sostatt hevur gjørt tvær skrivligar avtalur.

*Men hvør avtala er so galdandi, tá báðar avtalur geva ein meiriluta uppá sjey fólk?*

Høgni sigur, at í hansara verð er bara ein avtala, og tað er hon, sum fyrst varð undirskrivað ímillum Fólkaflokkin og Sambandsflokkin.

– Tað seinasta eg visti var, at tað var tann einasta avtalan. Tað er jú púra óhoyrt at skriva undir fleiri avtalur. Men í morgun komu skelkandi tíðindini um, at hann eisini hevur skrivað eina aðra avtalu, greiðir Høgni frá.

Spurdur, um ikki hann og Beata munnu fara at fylgja Heðini og fara uppí samgonguna hóast alt, svarar ein ógvuliga avgjørdur Høgni, at hóast Heðin brýtur avtalur, so gera Høgni og Beata tað ikki.

### Skelkaður

– Sambandsflokkurin gjørdi eina avtalu, og hana fara vit at halda. Tað var alt avrátt í sátt og semju í nátt, og alt var greitt. Sjálvt nevndarsessir og formanssessir vóru longu um at verða avgreiddir. Samráðingarnar gingu bæði skjótt og væl, uttan nakrar trupulleikar, sigur Høgni.

– Tí skelkar tað meg, at Heðin nú hevur brotið avtaluna, vent okkum bakið og einsamallur hevur skrivað undir við teimum eisini, sigur Høgni.

Spurdur um hetta fer at fáa avleiðingar fyri Heðin, svarar Høgni Mikkelsen, at hann persónliga ikki fær framt nakrar avleiðingar.

– Men eg vil sanniliga hopað, at hetta fær avleiðingar fyri hann. Hetta er so langt úti, at hvørki eg ella Beata hava orð fyri tí. Men vónandi fær tað avleiðingar, tá ein maður brýtur orðið, sum Sambandsflokkurin hevur givið, sigur Høgni at enda.

### Kvinnurnar hava meirilutan í samgonguni í Havn

Í nýggju samgonguni í Havn hava kvinnurnar meiriluta.

Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov úr Javnaðarflokkinum, Hildur Eyðunsdóttir og Marin Katrina Frýdal úr Tjóðveldisflokkinum. Tær eru fýra, meðan menninir eru tríggir: Jógvan Arge, Leivur Hansen og Heðin Mortensen.

Um so verður, at Beate L. Jensen eisini verður við í samgonguni, so verður meirlutin hjá kvinnunum enn størri.

Hetta er fyrstu ferð, at so nógvar kvinnur eru valdar í Tórshavnar Býráð.

**Páll**